Vikuskiftis Sosialurin
Nr. 90 - 11. mai 2007

# SEV – ein senil organisatión

REIDAR NÓNFJALL



Eg havi, sum aðrir borgarar í hesum landinum fylgt við áhuga gongdini í at umskipa og broyta kommunala stovnin SEV. Sjálvt um vit skriva 2007 og flestu almennir stovnar og skipanir hava umstillað seg til opinleika um tað virksemi, sum skattaborgarin rindar fyri, so berjist leiðslan í SEV við allari megi fyri afturlatni og ikki at missa vald. Leiðslan tosar um vald og aftur vald í SEV mótvegis landsmyndugleikunum og harvið eisini kundunum.

Í organisatoriskum samanhangi er spennandi at lýsa, hvørja diagnosu vit kunnu stilla einari slíkari organisatión sum SEV og hvørju opinlýstu sjúkueyðkenni gera seg galdandi. Tað skal eg venda aftur til.

Tað, sum fær meg at gera hesar viðmerkingar er, at eg í longri tíð havi sæð SEV sum eina sjúka organisatión samstundis sum eg í skjótt 15 ár havi rindað nógvar tíggjutúsundtals krónur í elrokningum, at SEV er ein interkommunalur/almennur stovnur og at eg onki val havi sum borgari ella kundi at velja ein annan veitara av el. Aðrar orsøkir eru av meira vinnuligum slag.

Ein onnur meira politisk orsøk er, at eg gjarna vil verða við til at ríva niður múrin millum SEV og kundan/borgaran og harvið ávirka gongdina at umleggja grundleggjandi henda stovn. At síggja ”páfuglarnir ella ovastu leiðsluna í SEV breiða seg út, minnir um sovjetiskar tilstandir, har ovasta leiðslan tignarliga stendur og heilsar við einum múri og palli út til kundan/borgaran. Tú skalt ikki taka feil av, at her er talan um at varðveita vald og tann, sum hevur ætlanir um at bróta inn í hetta ”heilaga tempul” skal hugsa seg um

Eg havi, sum aðrir borgarar í hesum landinum fylgt við áhuga gongdini í at umskipa og broyta kommunala stovnin SEV. Sjálvt um vit skriva 2007 og flestu almennir stovnar og skipanir hava umstillað seg til opinleika um tað virksemi, sum skattaborgarin rindar fyri, so berjist leiðslan í SEV við allari megi fyri afturlatni og ikki at missa vald. Leiðslan tosar um vald og aftur vald í SEV mótvegis landsmyndugleikunum og harvið eisini kundunum.

**Um hugtakið**

Hugtakið kreativitetur hevur fingið ein týdning, sum nakað sera positivt, nútímans, uppbyggjandi, mennandi o.a. Eisini verður hugtakið brúkt saman við øðrum óítøkjuligum og truplum hugtøkum sum visjón, strategi, nýskapan, uppfinnilsir, ella innovatión, granskning og íverksetarí.

Verður hugt í føroysku orðabókina er orðið kreativitetur umsett til "skapandi", og kreativitetur "(ný)skapanargáva, skapanarhugur, skapanarevni".

**Broytingar í SEV**

Endamálið við fyriliggjandi broytingunum í SEV sigst at verða at gera stovnin smidligari og nútíðarhóskandi – frasir ella innantómt tos. SEV skal gerast ein dynamiskur og effektivur stovnur, sum gevur bíligastu og bestu tænastuna og elveitingarnar. Fyri at kunna náa hesum málinum skal bygnaðurin grundleggjandi broytast og tað sama leiðslubygnaðurin.

Í løtuni sita heili 70 limir í umboðsráðnum, herav 20 frá Tórhavnar kommunu. Tað er rættuliga vist, at flestu av hesum limum hava sera avmarkaðar upplýsingar um, hvat veruliga hendir í felagnum, ongi leiðsluamboð at arbeiða eftir, og tí hava teir ikki ein kjans at gera sína ávirkan galdandi. Harafturat hava flestu av limunum ongan førleika at útinna tað ávirkan, sum skal til.

Skipanin er óhugnaliga tung og stirvin og er ein leivd frá sovjettíðini. Kortini virkar tað sum um, at umboðsráðið roynir at forða fyri, at broytingar verða gjørdar og vil hava umhugsunartíð. Umboðsráðið og leiðslan í SEV hava havt 15 ár at gera broytingar í, men onki er hent – tí muga hesir limir ikki sleppa at undirgrava tær ætlanir, sum eru um broytingar.

**SEV - ein statur í statinum**

SEV hevur seinastu árini virka og ført seg fram sum ein statur í statinum. Stovnurin hevur verið "lukkað land" fyri tíðindafólk, borgaran, vinnuna o.o. Tað syrgiliga av øllum hesum er, at politiska skipanin og aðrir áhugabólkar í samfelagnum hava góðtikið hesa primitivu ella ósiviliseraðu framferð í nógv ár – hesi hava undir øllum umstøðum ikki gjørt nakað munagott fyri at krevja opinleika og menning av stovninum.

Limirnir í umboðsráðnum tosa í fjølmiðlunum um broytingarnar á stovninum sum var tað teirra privata ogn – málburðurin er td. mín persónliga meining ella míni persónligu áhugamál í SEV eru.

SEV góðtekur heldur ikki, at kappingarlógin er galdandi fyri teirra stovn, og fyri fáum árum síðan fekk ongin heldur innlit í teirra virksemi vísandi til lógina um alment innlit. Sostatt er talan eisini um ein stovn, sum ikki ynskir at verða lóglýðin og virðir ikki landsins samfelagsskipan.

SEV verður eisini nevndur sum ein sosial skipan – hugsa sær ein sosial skipan, sum hevur til uppgávu at geva føroyskum húskjum og fyritøkum el, skal útfylla landsins orkupolitikk og umsitur nógvar milliónir í pengum og er stýrd av fólkum úti í kommununum, sum flestu als ongan førleika hava at stýra einari fyritøku ella stovni. Ein social skipan, sum bara tosar um at brúka vald – men vald korrumperar.

**Kommunikatión frá SEV er vorðin til villleiðing**

SEV er eftir stórum trýst frá umverðini noytt at fremja umleggingar og hevur seinastu tíðina láti sum um, at nú er opinleiki – hetta er als ikki veruleikin. Talan er um eitt kosmetisk tiltak frá leiðsluni og minnir heldur um at villleiða almenningin. Eftir hondini virkar alt, sum leiðslan í SEV kemur við ótrúverdugt – hetta kann prógvast við, at lítlar og ongar avgerðir verða tiknar í SEV um broytingar av stovninum.

Fjølmiðlarnar eiga tí at kanna nógv nærri, hvat veruliga hendir á stovninum og lýsa hetta fyri føroya fólki. Leiðslan velur at seta fyltur á alla kommunikatión og sleppur út teimum upplýsingum, sum hon best kann liva við og sum passar best til teirra format og tign.

**SEV - ein senil organsiatión og terapi**

SEV hevur sum stovnur verið gjøgnum nógvar ymsar fasir í teirra lívscyklus. Í løtuni er stovnurin farin í tað, sum verður kallað senilitet (farin av elli). Tað sum eyðkennir SEV er fylgjandi:

- Perónligt stríð
- Leiðarar stríðast ímóti hvør øðrum
- Jagstran eftir syndabukkum
- Sínámillum álop
- Orkan brúkt til innanhýsis stríð
- Persónligt yvirlivilsisstríð
- Ongar broytingar og teamwork
- Bara skipanir, reglur og mannagongdir
- Ongin handling og ongi munagóð úrslit
- Avbyrging frá umverðini.

Ein effektivur máti at viðgera eina slika organisatión ella forða fyri einari framhaldandi ellistilgongd er at skifta út leiðandi persónar og fremja bygnaðarbroytingar.

**SEV og menningarprosjektir við almennum pengum**

SEV hevur átikið sær leiklutin at menna nýggjar orkumøguleikar í Føroyum og stovnurin eksperimenterar við millióna upphæddum, sum kundin noyðist at rinda fyri og uttan, at kundin ella landið veit, hvørji endamál peningurin ítøkjuliga fer til.

Landið eigur at steðga hesum ætlanum og áleggja stovninum at fremja ætlanir, sum samsvara við landsins langtíðar orkupolitikki og vinnupolitikk.

**Kappingarráðið**

Kappingarráðið skal hava rós uppiborið fyri við lógini í hondini at hava sett henda betongstovn uppá pláss – vísti Kappingarráðið ikki áhaldandi treiskni at krevja innlit og upplýsingar var onki sum helst hent í SEV av egnum vilja og ynski.

Kappingarráðið hevur eisini roynt at skapa fortreytir fyri, at aðrir veitarar av el kunnu brúka kervið og at lækka prísirnar. Hetta hevur partvíst eyðnast við, at felagið Røkt eisini veitir el til SEV-kervið, men enn er langt eftir á mál.

**Orkupolitikkur ein landsuppgáva**

SEV hevur í nógv ár staði sum garanatur fyri føroyskum orkupolitikki og menning á økinum. Síðan hevur landsstýrismaðurin í vinnumálum, Bjarni Djurholm, nýliga broytt hetta og flutt orkupolitikk til eina landsuppgávu.

Landsstýrismaðurin eigur at halda áfram og krevja bygnaðarbroytingar á stovninum fyri, at hesin yvirhøvur skal verða førur fyri at fylla út landsins orkupolitikk.

**Umskipan til alment partafelag**

Tað eigur at verða eitt krav frá politiska myndugleikanum, sum varða av landsins orkupolitikki, at SEV verður umlagt til eitt alment partafelag skjótast gjørligt. Endamálið er, at SEV við einari umlegging best verður ført fyri at røkja landsins orkuáhugamál og umstilla seg til nýggj kundakrøv og samfelagskrøv. Uppgávurnar hjá stovninum eiga at endurskoðast frá grundini av og fyriskipast innanhýsis av nýggjum.

SEV er ikki ført fyri við verandi bygnaði at liva upp til tey krøv, sum ein effektiv el-veitingarstovnur eigur at liva upp til í 2007 og komandi árini.

**Nýggjur leiðslubygnaður**

SEV eigur í sambandi við eina umlegging til alment partafelag at fáa ein nýggjan leiðslubygnað. Tað verður avgerandi neyðugt fyri at skapa dynamik og effektivitet í virksemi og leiðsluarbeiðið, at umboðsráðið verður avtikið.

Verandi stýrið eigur at skiftast út við eitt professionelt stýrið við fólkum, sum hava besta fakliga førleikan at taka avgerðir um mál, sum hava týdning fyri virksemi uppá longri sikt o.a. Stýrið eigur ikki at telja meira enn 7-9 limir.

Meginparturin av dagligu leiðsluni í SEV eigur at verða skift út – serliga tí, at tað er henda, sum hevur verið við til at forða fyri broytingum øll hesi árini. Meginparturin av verandi leiðslu í SEV fer ikki loyalt at virka fyri, at grundleggjandi bygnaðarbroytingar fara at eydnast.

**Strategiætlan fyri SEV**

Leiðslan í SEV eigur at fáa álagt at gera eina strategiætlan fyri stovnin sum skal tryggja, at hesin aktivt mennir sítt tilverugrundarlag og ikki verður eftirbátur um heilt stutta tíð.

Ein strategiætlan fyri SEV skal eisini tryggja, at vit í Føroyum fáa bíligastu og bestu tænastuna og elveitingarnar frá stovninum.

**Tórshavn tann
10 mai 2007**

Eg havi, sum aðrir borgarar í hesum landinum fylgt við áhuga gongdini í at umskipa og broyta kommunala stovnin SEV. Sjálvt um vit skriva 2007 og flestu almennir stovnar og skipanir hava umstillað seg til opinleika um tað virksemi, sum skattaborgarin rindar fyri, so berjist leiðslan í SEV við allari megi fyri afturlatni og ikki at missa vald. Leiðslan tosar um vald og aftur vald í SEV mótvegis landsmyndugleikunum og harvið eisini kundunum.

Í organisatoriskum samanhangi er spennandi at lýsa, hvørja diagnosu vit kunnu stilla einari slíkari organisatión sum SEV og hvørju opinlýstu sjúkueyðkenni gera seg galdandi. Tað skal eg venda aftur til.

Tað, sum fær meg at gera hesar viðmerkingar er, at eg í longri tíð havi sæð SEV sum eina sjúka organisatión samstundis sum eg í skjótt 15 ár havi rindað nógvar tíggjutúsundtals krónur í elrokningum, at SEV er ein interkommunalur/almennur stovnur og at eg onki val havi sum borgari ella kundi at velja ein annan veitara av el. Aðrar orsøkir eru av meira vinnuligum slag.

Ein onnur meira politisk orsøk er, at eg gjarna vil verða við til at ríva niður múrin millum SEV og kundan/borgaran og harvið ávirka gongdina at umleggja grundleggjandi henda stovn. At síggja ”páfuglarnir ella ovastu leiðsluna í SEV breiða seg út, minnir um sovjetiskar tilstandir, har ovasta leiðslan tignarliga stendur og heilsar við einum múri og palli út til kundan/borgaran. Tú skalt ikki taka feil av, at her er talan um at varðveita vald og tann, sum hevur ætlanir um at bróta inn í hetta ”heilaga tempul” skal hugsa seg um

---

*framhald av síðu 13*

seks árum síðani skipa samgongu saman við Fólkaflokkinum. Men her vóru heilt greitt onkrir innanhýsis lekar, ið spældu hund, tí hóast vit avtalaðu taktikk í sambandi við samráðingarnar, so visti Fólkaflokkurin alla tíðina, hvat okkara næsta stig fór at verða, og tí var høpileyst at stríðast fyri at vinna Sambandsflokkinum ta ávirkan, valúrslitið hevði lagt upp til.

Ein kann bara gita sær til, hvør hevur likið og ikki, men í øllum førum var enn eina ferð greitt, at her varð alt ofrað, so tað barasta ikki skuldi eydnast Heðini Mortensen at fáa nakað burturúr. So kundi tað annars gera tað sama, hvussu gekst við flokkinum!

Og søguna um síðsta kommunuvalið kenna øll eisini, har tað somuleiðis var vónleyst at vinna Sambandsflokkinum ávirkan, tí ein avtala longu var gjørd millum Jan Christiansen og Høgna Mikkelsen um, at Høgni í einum og øllum skuldi stuðla Jan, so hann kundi aftur sleppa at sita í borgarstjórasessinum í fýra ár. Er hetta trúskapur ímóti Sambandsflokkinum? Eg spyrji bara!

Hetta endaði sum sagt við, at flokkurin vendi mær bakið og tveitti meg út, og harvið kundi tað so verið liðugt og friður. Men nú Sambandsflokkurin enn eina ferð hevur sett seg sjálvan í eina pínliga støðu, tí Bárður Nielsen hevur lagt frá sær og Kaj Leo Johannesen vil sleppa í landsstýrið, samstundis sum tað merkir, at javnaðarmaðurin Heðin Mortensen kemur inn á ting, sum veljararnir hava valt, kenni eg meg noyddan at leggja kortini á borðið.

Sambandsflokkurin kundi lættliga sloppið undan øllum hesum ruðuleikanum við at peika á onkran annan enn ein úr Suðurstreymoy at fara í landsstýrið, so var einki meira at tosa um. So var friður, og alt hevði fingið frið í gloymskunnar havi. Men Sambandsflokkurin vildi eftir øllum at døma sleppa at geva mær enn eitt asnaspark.

Gjøgnum øll míni 20 ár sum virkin limur í Sambandsflokkinum havi eg gjørt mítt besta fyri at vunnið flokkinum atkvøður og ávirkan. Sum sæst omanfyri, hevur flokkurin bara ongantíð havt hug at lønt hart stríð aftur við øðrum enn myrkaspæli og ljótum taktikki, ið bert hevði til endamáls at halda meg burtur.

Nú tað enn eina ferð snýr seg um tingsessin í Suðurstreymoy, sum er komin í klemmu, orsakað av at Sambandsflokkurin hevur tveitt meg út og eg síðani havi tikið av tilboði um at gerast limur í øðrum flokki, Javnaðarflokkinum, skal eg bara heilsa og siga, at eg skyldi ikki Sambandsflokkinum nakað sum helst!

Flokkurin hevur øll árini bert viljað havt atkvøðurnar og ikki mannin. Nú kann flokkurin eiga atkvøðurnar, men mannin fær hann ikki! Farvæl og takk!